# Klæmint Weihe 60 ár



Fyrrverandi SEV-stjórin Klæmint Weihe fylti 60 ár mánadagin 25. oktober. Klæmint er sørvingur, men hann hevur megin-partin av ævi síni búð í Havn.

Klæmint er útbúgvin radiomekanikari og elek-troverkfrøðingur. Hann byrjaði á elfelagnum SEV í 1980 og tók við sum stjóri í 1982 og var stjóri í 25 ár. Klæmint var stjóri á SEV í eini tíð við nógvum broytingum og útbygginum. Eftir at hann gavst á SEV í 2007, var hann eitt skifti stjóri á fyritøkuni MVH á Hjalla.

Í dag starvast hann sum lærari á eldeildini á Tekniska Skúlanum í Tórshavn, umframt at hann eisini er stjóri á FDS, sum er ein almenn fyritøka sum ger digital kort- og myndatilfar um Føroyar.

Klæmint er giftur Ketty Dam úr Havn. Tey eiga børnini Karin og Heð-in. Abbabørnini er 4 í tali.

# Beinta og Heidi í Listaglugganum

Fríggjadagin kl. 16.00 letur upp nýggj framsýning í Listaglugganum. Tað eru Beinta og Heidi av Reyni, ið báðar eru búsitandi í Dan-mark, sum sýna fram máln-ingar og skulpturar. Beinta er væl kend á bæði føroyska og danska listapallinum og hevur sýnt fram í Føroyum áður. Tað er fyrstu ferð at Heidi sýnir fram í Føroyum; fyri stuttum síðani var hon við á sensureraðari fram-sýning hjá Kunstnernes Sommerudstilling í Tistrup.

Við á framsýningini í Listaglugganum eru 36 máln-ingar og skulpturar.

Framsýningin er at síggja í Listaglugganum næstu tvær vikurnar.



*Heidi og Beinta av Reyni*

---

nevnda sangi frá 1707 hjá Isac Watts: Tá andi mín hin kross kann sjá.

"See from His head, His hand, His feet,
Sorrow and love flow mingled down!
Did e´er such love and sorrow meet,
Or thorns compose so rich a crown".

Í føroyskari týðing ljóðar hetta 3. ørindið soleiðis:

"Hygg á hans sár, har blóðið rann,
hvussu hans sál av sorg er møðd!
Hvør hevur møtt tí sorg sum hann!
Hvar krýndu tornir slíkt eitt høvd!"

Kári plagdi at siga, at tað var salvilsi fyri sálina at hoyra hesar sangir.

Hesin fyrrverandi árhusi-anarin lýsti Kára sum ein mildan og spakføran mann við eini mildari og inniligari rødd.

Kári var kanska ov mild-ur og spakførur til at svara aftur á hóskandi hátt, tá lúsingarnir komu gjøgnum lívið, so hann kreyp longur og longur inn undir skjøld-urin.

Kári hevði góðar gávur, og hann gav mongum nógvar góðar løtur við tí stóra ómaki, hann legði í krossorðini, sum hann gjørdi hvørja viku inntil fyri 14 árum síðani. Nógv hava tikið til hesi krossorð, sum tey gleddu seg til, hvørja ferð blaðið kom út.

Kári var á hesum sum øðrum økjum nærlagdur. Hann gjørdi sær stóran ómak og hevði nógvar antennur langt úti, tá hann arbeiddi við hesum orðum, máliskum, vendingum, persónum og hendingum, sum hann onkursvegna fekk lumpað og lirkað inn í hesar teigar í krossorðagátuni. Har var eisini ítróttur – men mangt annað so sum politikkur, humor, søga, átrúnaður og mentan. Fólk fingu nakað, tá tey settu seg við hesum væl úr hondum greiddu kross-orðum.

Tað var ikki lættisoppa-kent. Tað var áðrenn inter-netið breiddi seg út. Hann legði m.a. nógv arbeiði í at vitja bókasavnið fyri at finna myndir av ávísum persónum og citat, greinar og bókum um ymisk mál.

Tað hevði møguliga verið uppiborið, at Kári fekk eina M.A. Jacobsen virðisløn fyri serligar bókmentir, kross-orðagáturnar, sum hava ríkað so nógv fólk, og sum hava fingið fólk at forvitnast víða um í bókmentaheiminum.

Kári var hugtikin av mongum krossorðum um-framt krossorðunum hjá Isac Watts á plátuni hjá Ernie Ford.

Vit gráta um, at Kári er farin. Vit gráta eisini um, at vakri, sjarmerandi, humoristiski og gávuríki unglingin, sum leyp útí og bjargaði mær, og sum frøddi føroyska fótbóltsheimin í sekstiárunum, meir og meir kreyp inn undir skjøldurin eins og skjaldbøkan, og at hann seinni fekk eitt sera tungt lív

Vit takka tykkum øllum inniliga, sum hildu í og fevndu Kára, sjálvt um tað mangan var tungt.

Vit hava hvør sær knýtt bond til Kára – summi sterkari og longri enn onnur. Men lati okkum eina løtu halda í tað band, sum knýtti okkum at honum og gleðast um tað, hann gav okkum.

Takk fyri og farvæl, kæri bróðir.

**Árni**


ArtiCon søkir eftir
FÍGGJARLEIÐARA

Hevur tú áhuga í bókhaldi, roknskapi og fíggjarstýring, so er tú kanska persónurin, sum vit leita eftir.

Í sambandi við at fíggjarleiðari okkara hevur valt at taka við øðrum avbjóðingum, søkja vit eftir nýggjum fíggjarleiðara.

Talan er um eitt spennandi starv, sum umfatar allar tættir innan bókhalds- og roknskapararbeiði og fíggjarstýring umframt yvirskipað fyrisitingararbeiði. Avbjóvingarnar eru nógvar, og arbeiðsumhvørvið er jaligt og mennandi.

Høvuðsamboðini eru Navision við Invoice Workflow til bókhald, roknskap og fíggjarstýring, meðan LøttLøn verður nýtt til lønarbókhald.

Umsóknir við viðkomandi skjølum skulu sendast til niclas@articon.fo ella á postadressu okkara, sum er: P/F ArtiCon, Postboks 3109, 110 Tórshavn.
Merkið brævbjálvan »umsókn«.

Umsóknarfreistin er 31. okt. 2010.

Eru ivamál ella spurningar, er tú vælkomin at ringja til Niclas Joensen á tel. 216169 ella 350702 í vanligari arbeiðstíð.

ARTICON
á Hjalla · Postboks 3109 · 110 Tórshavn
tel. 350700 · fax 350705

Sosialurin 341800